# Ongar avbjóðingar hjá kvinnunum

**Í løtuni er óvist, hvørt A-landsliðið hjá kvinnunum fær nakrar avbjóðingar í hesum árinum, og í landskappingini tykist tað so vera víst, at KÍ ikki fær minsta vetið av mótstøðu**

**Jákup Mørk**
*jakup@sosialurin.fo*

Tað stendur einki til við føroyskum kvinnufótbólti fyri tíðina.

Seinastu mongu árini hevur tað at kalla bert verið eitt lið – KÍ – sum hevur sett dagsskránna, og tó at HB ta einu ferðina fekk sníkt seg inn við einum steypasigri, so var hetta einamest takkað verið styrkinum, sum liðið ta ferðina fekk úr Danmark, og ikki nakað sigandi dømi um, at aðrir avbjóðarar vóru til oddasessin hjá KÍ.

Og hóast vit enn ikki eru farin í holt við landskappingina fyri 2004, so tykist eingin ivi vera um, at tað aftur í ár verður KÍ, sum fer at standa á øllum. Og tað kanska í størri mun enn nakran tíð fyrr.

KÍ hevur nevnliga fingið tilgongd av tveimum leikarum, sum veruliga teljast millum tær bestu í landinum. Í málinum fer liðið í ár at hava Randi Wardum, sum kanska er besti kvinnuligi málverjin í landinum, og hartil fer Kristina Eyðbjørnsdóttir aftur í ár til Klaksvíkar, eftir at hon í fjør royndi seg hjá B68 eitt skifti.

Tí er ilt at síggja, hvaðani KÍ skal fáa nakra sum helst kapping í ár. Nærmast kemur helst B36, sum í ár hevur fingið bæði Halltóru Joensen og Rannvá Augustinussen úr HB, men sjálvt við hesum báðum á liðnum tykist tað vera sera ivasamt, um B36 kann náa stórt meira enn at vinna sær eitt greitt annað pláss. Kanska í kapping við B68/GÍ, sum í ár hava lagt kvinnuliðini saman.

Í aðrar mátar tykist kvinnukappingin ikki vera nakað, sum fólk kunnu øsa seg stórvegis um. Somikið ringur er standurin, at tað í HB hevur verið tosað um at taka liðið úr kappingini. Ein møguleiki, sum kanska eisini er ein staðfesting, tá hesar reglur verða lisnar.



*Í mangar mátar mundi Oyggjaleikaluttøkan hjá kvinnulandsliðnum vera at sammeta við eina hugnaliga summarútferð*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Ongar avbjóðingar

At standurin í føroyskum kvinnufótbólti er somikið ringur í løtuni, kemst kanska av tveimum orsøkum. Onnur er nevnd omanfyri – nevnliga at spenningurin í kappingini er fokin longu undan fyrsta bríkslinum – og hin er kanska meira týðandi. Tað eru nevnliga at kalla ongar avbjóðingar til tær, sum hava hug og tíð at nýta nógva orku til fótbóltin, og hetta má sigast at vera stórt spell.

Kvinnulandsliðið hevur verið við á teimum báðum seinastu Oyggjaleikunum, men tað má tó setast stórt spurnartekin við, hvørt hetta er nøkur avbjóðing. Heldur man hetta vera at sammeta við eina summarútferð hjá liðnum, har Fótbóltssambandið nýtir hópin av peningi til eina kapping, sum í mesta lagi kastar ein nýtiligan venjingardyst – finaluna – av sær, meðan hinir dystirnir eru spurningar um, hvørt liðið vinnur við eitt- ella tveysiffraðum tølum.

Altjóða undankappingar hava áður verið eitt tema í føroyskum kvinnufótbólti, men ta ferðina helt FSF ikki, at liðið stóð seg nóg væl, og síðani hevur tað verið so sum so við avbjóðingunum.

Ein møguleiki kundi her kanska verið millumtjóða kappingar við onnur lond á okkara støði, og eitt nú hevði landsliðsvenjarin samband við fleiri venjararhjá slíkum tjóðum, tá stevna var fyri kvinnufótbóltin í USA seinasta summar. Sum skilst, so hevur venjarin, Álvur Hansen, eisini latið boð um hetta til nevndina í FSF, men higartil hevur so ikki verið nakað aftursvar í so máta.

## Europa-Cup

Eftir stendur so bert ein avbjóðing, og tað er Europa-Cup luttøkan, sum KÍ kvinnurnar nú fara undir triðja árið á rað.

Tað er sjálvandi alla æru vert, at KÍ av sínum eintingum tekur hetta stig, tí tað er sanniliga nakað, sum krevur nógva orku, men samstundis er hetta viðvirkandi til at gera forfordeilingina í kvinnukappingini enn størri. Tað man so neyvan vera vegna avbjóðingar í landskappingini, at ein góður málverji leitar sær til Klaksvíkar at standa í málinum, tí her kemur Randi Wardum í mesta lagi at taka sær av nøkrum afturleggingum.

Hinvegin er einki at ivast í, at hon her sær fram til nakrar avbjóðingar í europeiskum høpi, sum hon ikki hevur møguleika at finna aðrastaðni.

## EM til U-19 liðið

Heilt uttan avbjóðingar eru kvinnurnar tó ikki. Tær yngru av leikarunum kunnu síggja fram til luttøku í EM-undankappingini fyri U-19 lið, og he hava Føroyar áður víst, at vit væl kunnu fáa heilt góð úrslit.

Bert spell, um avbjóðingar – og harvið menning – skulu steðga her, tí skal nøkur menning fara fram innan føroyskan kvinnufótbólt, so er eisini neyðugt, at avbjóðingar verða latnar eftir at tær eru fyltar 19.



